# ítróttur

Nr. 26 • hósdagur • 7. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


Landssliðsvenjarin:

## Úrslitini koma í aðru røð

**Virkandi landsliðsvenjarin Jógvan Martin Olsen sigur, at úrslitini í dystunum á venjingarleguni á Kypros ikki liggja fremst í huganum. Liðið skal fyrst og fremst spæla fótbólt. Hann heldur samstundis, at hetta er eitt kærkomið høvi hjá óroyndum leikarum at fáa spælitíð, tí flestu royndu leikararnir hava givið avboð**



*Jógvan Martin Olsen sigur seg hava í hyggju at royna eina nýggja spælskipan á Kypros. Honum dámar betur 4-4-2 enn 3-5-2. Hann sigur, at verjufótbóltur fer ikki at eyðkenna føroyska spælið, men leikararnir skulu hava møguleikan at spæla fótbólt*

*MYND: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í gjár, mikudagin, legði føroyska fótbóltslandsliðið hjá monnum leiðina til Kypros, har Fótbóltssambandið skipar fyri venjingarlegu.

Hetta er ein partur av avtaluni við týska felagið UFA, sum hevur keypt sjónvarpsrættindini til dystirnar hjá Føroyum. Umframt pening fær landsliðið eisini eitt uppihald á Kypros.

Tríggir venjingardystir eru á skránni. Sunnudagin spælir landsliðið fyrsta dystin, og hann verður móti Póllandi, sum jú luttekur í HM-endaspælinum í Japan og Korea í summar. Hesin dysturin verður sýndur beinleiðis í polskum sjónvarpi. Eisini eru dystir móti Liktinstein og einum polskum felagi.



*Palli Augustinussen hevur ongantíð spælt ein landsdyst. Hann er ein av teimum ungu og óroyndu leikarunum á liðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Eingin verjufótbóltur

Jógvan Martin Olsen er virkandi landsliðsvenjari, inntil FSF hevur funnið avloysaran fyri Allan Simonsen. Málverjin Jens Martin Knudsen er hjálparvenjari.

Hann leggur dent á, at hann fer ikki at spæla verjufótbólt við tíggju monnum aftanfyri bóltin.

– Vit fara ikki inn á vøllin og stilla okkum í verjustøðu frá byrjan av, slær Jógvan Martin Olsen fast beinanvegin. Hann leggur afturat, at hann ikki hevur sjálvt úrslitið av dystunum fremst í huganum.

– Eg fari at geva leikarunum møguleika at spæla fótbólt, so kann tað vera líkamikið, um vit tapa 6-0. Mest umráðandi er, at teir sleppa at spæla fótbólt, sigur landsliðsvenjarin.

### Óroyndur hópur

Undan hesi venjingarleguni hava fleiri spælarar givið avboð, og teir flestu útisetarnir eru bundnir í feløgunum, har teir spæla.

Av teimum spælarunum í Føroyum, sum hava givið avboð, kunnu nevnast Hans Fróði Hansen, Jens Kristian Hansen, Allan Joensen, Øssur Hansen og Fróði Benjaminsen. Síðani eru tað útisetarnir, sum heldur ikki kunnu vera við, og teir eru Julian Johnsson, Súni Olsen, Jákup Mikkelsen, Óli Johannesen og Todi Jónsson hevur enn ikki boðað frá, nær hann ætlar sær at spæla aftur við landsliðnum.

Her eru í øllum førum átta leikarar, sum hava fast pláss í byrjunaruppstillingini á landsliðnum, sum ikki vera við. Spurningurin er so, um venjingarlegan ikki missir sítt virði av hesum?

– Sjálvandi merkist tað, tá liðið missir so nógvar, sum vanliga eru við, sigur Jógvan Martin, sum tó dugir at síggja tað góða í hesum.

– Tað positiva í hesum er, at teir leikarar, sum ikki eru fastir í hópinum og sum hava sitið nógv á beinkinum, fáa møguleikan at spæla altjóða landsdystir og vísa, hvat teir duga, sigur venjarin.

Eingin ivi er um, at hesir leikarar eru findarglaðir um at fáa møguleikan frá byrjan av í einum landsdysti. Hesir eru tí eisini uppsettir til at vísa komandi venjaranum, at teir hava uppiborið pláss í hópinum ella á liðnum.

Nevnast kunnu leikarar sum Heðin á Lakjuni, Rógvi Jacobsen, Arnbjørn Danielsen, Andrew av Fløtum og Jóhannus Joensen, ið av og á hava verið í hitanum, men sum ikki hava fingið so nógvar minuttir á vøllinum tilsamans.

Hesir leikarar hava nú ein stóran møguleika at gera seg galdandi í landsliðshøpi.

### Nýggj spælskipan

Jógvan Martin Olsen avdúkar eisini, at hann hevur í hyggju at royna onkra aðra spælskipan enn Allan Simonsen, sum var vanur at nýta 3-5-2.

– Eg kundi væl hugsa mær, at vit fara at venja við eini aðrari spælskipan, enn leikararnir eru vanir við á landsliðnum. Øll tey yngru landsliðini spæla við 4-4-2 skipanini, og hesa skipan dámar mær nógv betur enn 3-5-2, tí økini verða betur dekkað, sigur Jógvan Martin.

Hann sigur, at hann ætlar at spæla onkran dyst við 4-4-2. Venjarin heldur ikki, at tað fer at vera torført hjá honum at venja hesa skipanina við leikarunum, tí fleiri eru vanir við hana í feløgunum.

Henda spælskipanin gevur fleiri nýggjar møguleikar. Venjarin skal eitt nú nú finna tveir vengur og ikki tveir vongbakkar sum fyrr. Heðin á Lakjuni er eitt upplagt val til vinstra vong, sum kanska er tað plássið, ið hóskar honum best. Í gomlu spælskipanini var ikki altíð pláss fyri einum leikara sum Heðini.

Eingin ivi er um, at leikararnir veruliga fáa roynt seg á venjingarleguni. Pólland skal til HM, og venjarin hevur enn ikki valt endaliga hópin. Tí verður tað eitt uppsett polskt lið, ið fer á vøllin móti Føroyum, tí allir leikararnir fara at royna at sannføra polska venjaran um at teir hava uppborið eitt pláss á liðnum. Teir kendastu leikararnir, sum spæla í evropeiskum stórfeløgum, vera ikki við í dystinum móti Føroyum.



## Dopingroyndir gjørdar í vár

**ÍSF hevur boðað frá, at tað fer undir at taka dopingroyndir av ítróttarfólki í vár. Hetta er samtykt á aðalfundi**

DOPING
*Stefan í Skorini*

Ítróttarsamband Føroya roynir at fylgja við í altjóða krøvum, sum sett verða ítróttarsambondum kring heimin. Í vár verða fyrstu dopingroyndirnar tiknar av føroyskum ítóttarfólki í Føroyum.

Hetta hevur aðalfundurin hjá ÍSF samtykt, og tað verður nú sett í verk.



*ÍSF-forsetin hevur sett í verk dopingeftirlit í Føroyum. Tvey fólk fara komandi vár at taka royndir av føroyskum ítróttarfólki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Skyldu at taka royndir

ÍSF sigur í tíðindaskrivi, at øll ítróttarfólk hava skyldu til at luttaka í eini dopingroynd, um tey verða innkallað til eina slíka. Um ítróttarfólk nokta at lata dopingroynd, verður tað mett sum ein positiv roynd.

Tveir triðingar av royndunum verða gjørdar undir venjing, og ein triðingur av royndunum verður framdur eftir kappingar og dystir.

IOC hevur ein lista yvir evni, ið eru bannað hjá ítróttarfólki at nýta. Um hesi evni verða funnin í land- ella blóðroyndum verður tað mett sum doping.

Dopin snýr seg tó ikki bert um tey ólógligu evnini, men eisini um framferðarhættir, ið kunnu káma ella fjala nýtsluna av ólógligum stimbrandi evnum.

ÍSF hevur sett eina dopingeftirlitsnevnd, og tað verða fólk úr hesi nevndini, ið fara at taka royndirnar. Tey eru tvey í tali, sum í vár fara at kanna, um føroysk ítróttarfólk nýta ólóglig stimbrandi evni eins og óteljandi útlendsk ítróttarfólk.

## Hull misti á stokkinum

**Í seinasta minutti skoraði Hartlepool útjavnandi málið móti Hull, sum førdi við steðgin. Julian og liðfelagar hansara mistu sostatt tvey týðandi stig**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Týskvøldið tók Hull City ímóti Hartlepool á heimavølli. Úrslitið gjørdist 1-1, eftir at heimaliðið hevði verið frammanfyri 1-0 við steðgin. Julian Johnsson spældi allar 90 minuttirnar.

Julian og teir eru sum vera man ógvuliga vónbrotnir um úrslitið, tí Hartlepool fekk útjavnandi málið ein minutti fyri leiklok, tá Hull lat mótstøðuliðnum eitt bíligt mál.

Hull legði seg framum fyri steðgin og hevði greiða yvirvág í spæli og málmøguleikum. Men eftir steðgin legði Hartlepool trýst á Hull og megnaði at fáa útjavnandi málið at enda.

Venjarin hjá Hull, Brian Little, var sera ónøgdur við sínar leikarar eftir dystin, og hann segði, leikararnir hildu, at dysturin var vunnin áðrenn síðsta bríksl.

Hull er framvegis á fjórða plássi í 3. deild.

### Missa spælarar

Í enskum fjølmiðlum stendur í dag at lesa, at teir báðir leikararnir frá Jamaica, Ian Goodison og Theodore Whitmore, eru á veg úr felagnum.

Hull hevur bjóðað teimum báðum nýggjan sáttmála, men hesir báðir hava noktað at skriva undir. Teir eru tí leysir á marknaðinum, og fleiri feløg hava áhuga í teimum báðum.

Hull ognaði sær leikararnar eftir HM í Frankaríki í 1998, tá teir spældu við Jamaica. Hesir eru evnaríkir, og tað er ein stórur missur hjá Hull, sum tó longu hevur fingið aðrar leikarar ístaðin.

## Rógvi heldur fram

**Venjarin hjá kvinnuliðnum hjá Kyndli segði sessin frá sær eftir tapið fyri Sóljuni um vikuskiftið. Hann hevur nú tikið uppsøgnina aftur og heldur fram sum venjari**



*Tað var eftir dystin móti Sóljuni, at kvinnuliðið brádliga var uttan venjara. Nú hevur hann tó játtað at halda fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Besta kvinnuliðið hjá Kyndli stóð brádliga uttan venjara, eftir at liðið tapti eina avgerandi botnuppgerð móti liðnum úr Vágunum, Sóljuni.

Rógvi Nielsen tók seg aftur sum venjara eftir dystin. Orsøkin var eftir øllum at døma, at úrslitini hava verið so avbera vánalig hjá Kyndli í hesum kappingarárinum.

Kyndil liggur í løtuni á næstaftasta plássi við trimum stigum saman við StÍF. Við sigrinum sunnudagin fór Sóljan framum Kyndil, og tað ljóðaði, at Rógvi tók seg aftur eftir dystin.

Nú er tó greitt, at hann heldur fram og fremsta uppgáva hansara verður at bjarga Kyndli frá niðurflyting.

Eingin ivi er um, at tað ikki hevur gingið eftir vild hjá Kyndli í ár, hvørki hjá kvinnunum ella hjá mansliðnum. Bæði liðini eru í botninum, og tað er ikki nóg gott hjá sigursvanda havnarfelagnum.

Sóljan-Neistin 16-31 (9-19)

### Neistin gjørdi bart

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Kvinnuliðið hjá Neistanum vann týskvøldið ein sera sannførandi sigur á Sóljuni. Munurin var 15 mál tá avtornaði

Fremstu kvinnuliðini hjá Sóljuni og Neistaum hittust í høllini á Giljanesi. Úrslitið var ein knúsandi sigur til Neistan. 31-16 var endaliga úrslitið.

Við sigrinum tók Neistin seg framum VB uppá triðja pláss. Neistin og VB hava bæði 13 stig í part, men Neistin hevur frægari málmun. VB hevur tó spælt ein dyst færri enn Neistin.

Tað hevur tíverri ikki eydnast okkum at fáa fatur á dómaraseðlinum frá dystinum.